# Skal verða bíligari at sigla við Strandferðsluni

**– Strandferðslan má ikki sleppa at hækka prísirnar á ferðaseðlum. Tvørturímóti skal tað verða bíligari at brúka Strandferðsluna, heldur Sambandsflokkurin**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*



*Sambandsflokkurin fer at gera tað, sum hann kann fyri at forða fyri, at prísirnir á ferðaseðlum hjá Strandferðlsuni hækka, soleiðis sum ætlaniner. Men flokkurin vil harafturat, at prísirnir á summum rutum skal lækka*

Strandferðslan má ikki sleppa at hækka prísirnar á ferðaseðlunum.

Tað heldur í hvussu so er sambandsflokkurin.

Flokkurin tekur ikki undir við ætlanini hjá Strandferðsluni og Vinnumálastýrinum um at hækka prísirnar á ferðaseðlunum hjá Strandferðsluni.

Tí fer flokkurin nú at leggja uppskot fyri Løgtingið, sum í fyrstu syftu hevur til endamáls at forða Strandferðsluni at hækka prísirnar á ferðaseðlunum.

Í øðrum lagi fer flokkurin at royna at fáa Løgtingið at samtykkja, at tað skal verða bíligari hjá teimum allarflestu at sigla við skipunum hjá Strandferðsluni.

Nú eitt nýtt ár byrjar, er tað annars ætlanin, at prísirnir hjá Strandferðsluni skulu hækka eini 15% frá fyrst í komandi ári.

Enn er ikki greitt, um príshækkingin kemur í gildi 1. januar, men tað verður í hvussu so er fyrst í árinum og tilsamans verður roknað við, at príshækkingin fer at gera Strandferðsluni eina eyka inntøku uppá seks milliónir krónur.

Hetta verður hildið at vera neyðugt fyri at Strandfeðslan kann halda játtanina uttan at lækka tænastustøðið munandi.

## Royn aftur

Men hetta vil sambandsflokkurin ikki góðtaka.

Alfred Olsen, tingmaður fyri flokkin, sigur, at flokkurin fer tí sum skjótast eftir nýggjár at leggja uppskot fyri løgtingið um at forða fyri at at prísirnir hækka.

Sambandsflokkurin hevur fyrr lagt uppskot fyri Løgtingið um prísirnar hjá Strandferðsluni, men ta ferðina kom onki burturúr við tað, at bara andstøðan atkvøddi fyri.

Eftir tí uppskotinum skuldi ferðaseðlarnir á øllum leiðunum hjá Strandferðsluni kosta tað sama og teir skuldi ásetast eftir teimum bíligaru leiðunum.

Sostatt skuldi ein vanligur ferðaseðil kosta einar 30 krónur og ein persónbilur skuldi kosta 80 krónur.

Hetta hevði gjørt tað munandi bíligari at siglt ímillum Suðuroynna og Havnina, tí har kostar ein vanligur ferðaseðil 70 krónur og ein persónbilur kostar 120 krónur.

Alfred Olsen sigur, at nú fer Sambandsflokkurin at laga hetta uppskotið til og at leggja tað fyri Løgtingið einaferð afturat.

– Í fyrstu atløgu fara vit at royna at forða fyri at Strandferðslan sleppur at hækka prísirnar. Men í øðrum lagi fara vit eisini at skjóta upp at prísirnir á øllum leiðum hjá Strandferðsluni skulu kosta tað sama.

Alfred Olsen sigur, at príshækkingin hjá Strandferðsluni rakar eina og aleina tey, sum búgva í útjaðaranum í Føroyum, tey, sum búgva í Suðuroy, í Sandoy og í teimum smáu útoyggjunum. Men tey, sum búgva í miðstaðarøkinum, verða als ikki nervað av tí.

– Tí rakar hetta ógvuliga skeivt og er í andsøgn við tann útoyggjapolitikk, sum Samgongan sigur, at hon hevði ætlað at føra.

Tí vónar hann eisini, at fáa undirtøku frá onkrum í samgonguni til uppskotið, so at tað verður samtykt í Løgtinginum til frama fyri útjaðaran í Føroyum - Ikki minst nú samgongan sigur set hava sett økismenning í hásæti og hevur enntá sett fulltrúa at arbeiða við útjaðaramálum.

## Kostar onki

Løgtingsmaðurin úr Eysturoynni væntar ikki, at hetta fer at vera eitt fíggjarligt bakkast fyri Strandferðsluna.

– Vit vita, at tá í ferðamøguleikarnir batna, fara fleiri fólk at ferðast. Tí ivast vit heldur ikki í, at hetta fer at føra til, at fleiri fólk fara at ferðast og tí vænta vit ikki, at tað fer at kosta Strandferðsluni nakað.

– Og harafturat verður nøgdin við tænastuna hjá Strandferðsluni størri, tí tænastan fer at batna.

Á heysti í 2004 fáa suðuroyingar nýggja ferju og Alfred Olsen ivast ikki í, at lækka prísirnir á ferðaseðlunum fer tað at føra til, at nógv fleiri fólk fara at ferðast til og úr Suðuroynni, tí tá hava tey ráð at ferðast. Og tað heldur hann eisini hevði verið ein stórur fyrimunur fyri trivnaðin í oynni og so er eisini nakað vunnið.

Men hinvegin heldur hann eisini, at tað er onki ónatúrligt, at tað kostar eitt sindur fyri landskassan at varðveita ferðasambandið við útjaðaran og at landið tískil betalir eitt sindur til tað endamálið.

# Mangt undarligt kann reka á land

**Nú um dagarnar varð ein sandvíkingur heitur um skallan, tá ið hann fann ein løgnan reka á sandinum í Sandvík**

REKI
*Áki Bertholdsen*



*Mangur undarligur reki kann vera at finna, men hesin rekin, sum ein sandikingur fann herfyri, er av teimum heilt sjáldsamu. sum hann gekk á sandinum í øðrum tonkum, gekk hann seg fram á hetta konufólkabeinið*

Nú eru tað ikki so mong, sum leita eftir reka longur, tí nú á døgum hevur tað ikki sama týdning sum fyrr, tað sum kundi reka á land eftir pálandsvind.

At leita eftir reka vóru heldur ikki beinleiðis ørindini hjá einum sandvíkingi, sum fór sær ein túr eftir sandinum nú ein dagin.

Ikki tí, útlitini fyri at finna okkurt forvitnisligt skuldu avgjørt verið til staðar, nú tað hevur verið rættilig nógv eysturætt og hann hevur hevur ligið tráður inn ígjøgnum fjørðin við rættiliga nógvum vindi í fleiri vikur.

Og snýttur varð hann so sanniliga ikki, tí tað, sum hann fann, man vera av sjáldsamastu rekum, sum eru funnir her á landi.

Sum hann gekk í øðrum tonkum sá hann brádliga eitt bein stinga upp úr sandinum. Hetta var eitt konufólkabein í brúnum svartaskógvi við væl bundnari lissu og nylonsokki.

Sandvíkingurin viðgongur, at tá ornaði hann um skallan, men hann leggur afturat, at hann mátti manna seg upp at vita, hvat hetta var fyri nakað.

Tá ið hann so kannaði tað nærri vísti tað seg tíbetur at vera eitt gjørt bein til onkran, sum hevur mist beinið.

Men tað gjørdi ikki støðuna frægari í fyrstu syftu, tí nú mátti hann eisini vita um hann fann nakað, sum »hoyrdi til«, sum hann málber seg. Men har var onki at finna og lættur um hjartað stevndi hann heimaftur.



# Landastrokið sum øll vildu eiga á jólum



*Hentzar Steingrímsson, sum hevur gjørt Landastrok. Rættiligur gravgangur hevur verið eftir hesin nýggja føroyaspælinum, og stigtakarin kundi óivað sloppið av við nógv fleiri enn tey 3000 eintøkini, sum eru prentað*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Eingin jólagáva megnaði sum Landastrok at savna føroyingar á jólum. Spælið varð útselt eftir tíggju døgum, og hóast onkur sigur seg hava funnið villur í svarunum, so lata fólk sera væl at. – Føroysk viðurskifti eru sjálvandi meira viðkomandi fyri føroyingar, sigur Hentzar Steingrímsson, sum hevur gjørt Landastrok**

VÆLEYDNAÐ SPÆL
*Theodor E. D. Olsen*

Ofta verður sagt, at jólini eru høgtíðin, tá familjan savnast, og í ár gjørdi serliga ein maður sítt til at savna alt Føroya fólk rundan um stovuborðið. Vit tosa sjálvandi um Hentzar Steingrímsson, sum stutt fyri jól sendi spælið Landastrok á marknaðin, og sum hevur fingið føroyingar at hugna sær við spurningum allar jóladagarnar.

– Eg hevði varhugan av, at spælið fór at verða væl umtókt, men eg varð púra paff av, at tað bleiv útselt eftir 10 døgum, sigur Hentzar.

Hann hevur í fleiri ár spælt sær við tankanum um at gjørt eitt tílíkt spæl og hevur tað seinasta árið arbeitt miðvíst við at gera Landastrok til veruleika. Hentzar hevur sjálvur skrivað allar spurningarnar, sum eru flokkaðir í seks kategoriir, og hann gjørdi eisini fyrsta uppskotið til spæliplátuna, sum er eitt føroyakort. Byrjað verður í Fugloy, síðani verður farið vestureftir, og tann, sum fyrst kemur suður til Sumbiar, hevur vunnið spælið. Sera misjavnt er, hvussu nógva tíð fólk brúka um spælið. Til ber nevniliga bæði at spæla sum einstaklingar og sum bólkur ímóti bólki, og tá er ymiskt, hvussu drúgt spælið kann blíva. Tað skjótasta Hentzar veit, at nakar hevur ferðast kring landið við Landastroki, er ein tími, men tá skal ein eisini vera serliga kringur í øllum sløgunum av spurningum, sum m.a. eru mentan, ítróttur, náttúra og almenn vitan.

Eftir at hava gjørt spurningar og spæliplátu, vendi Hentzar sær til Hannis Egholm, sum hevur endaliga hevur sniðgivið spæliplátuna. Harafturat hava Hanus A. Samuelsen, Steingrím Niclasen, Zakarias Wang, Hans Holm, Svenning Tausen og Súni Merkistein rættlisið og kannað spurningar og svar.

## Meira viðkomandi

Hentzar Steingrímsson sigur seg bara hava fingið positivar reaktiónir frá fólki, og eisini fólk, sum vanliga ikki plaga at spæla tílík spøl, lata væl at. Orsøkina til hetta metir Hentzar vera, at Landastrok snýr seg um Føroyar og føroysk viðurskifti, og er tí meira viðkomandi enn útlendsk spøl.

Og áhugin má sigast at hava verið stórur. Landastrok varð prentað í 3000 eintøkum, og eftir at tað frættist, at tað var útselt, hava fleiri ringt til Hentzar, og spurt, um ikki okkurt eintak av Landastroki var eftir.

Enn er tó støða ikki tikin til, um fleiri eintøk verða prentað, ella um ein nýggj útgáva av Landastroki verður gjørd. Hentzar viðgongur, at hann sjálvandi hevði latið gjørt fleiri eintøk, um hann visti, at slíkur gravgangur fór at verða eftir spælinum.

Men sum hann sigur, at høvdu 5000 eintøk verið gjørd, so hevði triðja hvørt húski í Føroyum átt eitt eintak av spælinum, og tað hevði hann ikki roknað við frammanundan. Slík spøl eru nevniliga ikki bílig at prenta, og tí heitti Hentzar á Føroya Tele, Smyril Line, Føroya Shell, Føroya Bjór og Føroya Sparikassa um at stuðla spælinum. Aftur fyri fingu fyritøkurnar sítt navn á svarkortini inni í spælinum, og tann møguleikan lótu tær ikki fara afturvið borðinum.

## Villur millum svarini

Men hóast Landastrok man vera tann jólagávan, sum eina mest setti dagsskránna um jólini og savnaði fólk, so er spælið ikki heilt lýtaleyst.

2880 spurningar eru í spælinum, men tó hevur onkur funnið svar, sum ikki eru røtt, og hesum veit Hentzar av. Hann sigur, at teir gjørdu sítt besta, men avgjørdu, at hóast onkur hendinga villa óivað fór at stinga seg upp millum teir mongu spurningarnar, so mátti arbeiðast til eitt punkt, har ein kundi liva við úrslitinum og senda spælið til prentingar. Hann leggur afturat, at hann ongantíð enn hevur spælt eina útgávu av Trivial Pursuit, har eingin feilur var í, og tí er torført at sleppa undan slíkum.

Men Hentzar Steingrímsson er fegin um, at Landastrok var tann jólagávan, sum flest fólk savnaðust og tosaðu um á jólum í ár. Bøkur o.a. kunnu nevniliga verða góðar gávur, men kunnu sum oftast bert lesast av einum í senn. Spøl sum Landastrok savna harafturímóti, og á jólum í ár savnaði Hentzar og Landastrok alt tað føroyska húskið líka úr Fugloy til Sumbiar til jólahugna og spurnarkapping.